# Nullloysn í toppdysti

**Uttan svenska stórmeistaranum á liðnum í fjórða umfari, eydnaðist tað kollfirðingum at leika 2-2 móti klaksvíkingum og harvið varðveita fyrsta plássið**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Við einum munandi styrktum havnarliðið er spenningurin um fyrsta plássið kanska ikki bert ein spurningur ímillum tvey lið. Áðrenn vit hyggja nærri at nýggja havnarliðnum, fara vit til Kollafjarðar har klaksvíkingar vóru á vitjan.

Kollfirðingar høvdu undan dystinum eitt stig meira enn klaksvíkingar. Uttan Tiger Hillarp-Persson á liðnum — hann telvaði um vikuskiftið í donsku liðkappingini — varð mett at dysturin fór at blíva javnur. Kollfjarðaliðið hevur helst tí sterkastu trio´ina í Føroyum; Hans Kristian Simonsen, Torbjørn Thomsen og Eyðálvur Johannesen. Stigatalvan er prógv um hetta. Teir hava verið støðugir, og sjálvt um teir ikki altíð hava sama telvara á fjórða borði, kann liðið við ella uttan Tiger, vinna FM fyri fyrstu ferð síðani 1998.

Hans Kristian og Ólavur Simonsen leiktu javnt, eins og Torbjørn Thomsen og Rani Nolsøe. Eyðálvur vann á Finnbjørn Vang, meðan Tummas Martin Anthoniussen bjargaði klaksvíkingum javnleikin við sínum sigri á Grettir Djurhuus.

### Bogi Ziska við Havnini

Havnarliðið hevði sunnudagin tveir styrkir í mun til hini umførini. Bogi Ziska, sum annars leikti við toftamonnum fyrstu tvey umførini, hevur fingið loyvi at skifta felag mitt í kappingini, og leikar nú við føroyameistarunum úr Havnini. Hann mannar 2. borð aftanfyri Olaf Berg, og framanfyri Haldur Suna Johansen á 3. borði, sum leikti sítt fyrsta talv í vetur um vikuskiftið.

Sandavágsmenn komu á vitjan, og einans Torkil Nielsen fekk okkurt stigið heimaftur við sær. Fyrrverandi føroyameistarin leikti javnt móti Olaf Berg, meðan Havnin vann hinar uppgerðirnar.

Um Havnar Telvingarfelag hevur sama lið framyvir, er ikki óhugsandi at teir kunna blanda seg í oddastríðið. Fýra stig eru upp til kollfirðingar, og tað er tó møguliga eitt vet ov nógv.

Eitt skert toftalið — uttan Jens Kristian Hansen og Boga Ziska — fekk eitt heiðurligt úrslit í Hvalvík. Heimaliðið vann "einans" 2,5 — 1,5, men nevnast eigur eisini, at Rógvi W. Rasmussen var ikki við hvalvíkingum sunnudagin.



*John Rødgaard var annar av telvarunum á føroyska liðnum, sum megnaði at fáa stig móti krútsterka Helsinge*

### Vestmenningar beina kós

Í 2. deild stendur kappingin um uppflyting millum vestmenningar og havnarmenn. Vestmenningar tóku leiðsluna eftir vikuskiftið eftir ein góðan 3-1 sigur á runavíkingum, meðan havnarliðið tapti móti kollfirðingum. Eitt stig er á muni millum liðini.

Átta lið eru í 3. deild, og har tykist kappingin longu avgjørt. Havnin 3 hevur seks stig fleiri enn gøtumenn á øðrum plássi. Seks umfør eru leikt av teimum fjúrtan sum telvast skulu.

Hjá unglingunum hava bæði klaksvíksliðini lagt seg í oddin. Ellivu lið umboða deildina, og á flestu liðunum er talan um ungdómar undir 15 ár. Eitt tekin um at føroysk telving hevur brynjað seg væl til framtíðina.

### Talvfelagið Føroyar í norðatlantiskum illveðri

Í stásiligum umhvørvi á Norðuratlantsbryggjuni sunnudagin, tók føroyska liðið í donsku 1. deild ímóti danmarksmeistarunum seinastu trý árini, Helsinge. Teir hava millum annað stórmeistaran og sterkasta norðurlending Peter Heine Nielsen á liðnum, eins og GM Lars Schandorff og fleiri altjóða meistarar.

Útlitini vóru annars góð eftir einar tríggjar tímar. Heini Olsen og John Rødgaard - sum leikti við vegna avboð frá norska stórmeistaranum á liðnum Einar Gausel — høvdu leikt javnt. Hini seks talvini tóktist spennandi og opin. Men við ein brest rapblaði allar føroysku støðurnar og allir taptu. Orsøkirnar til bráðligu niðurgongdina var hjá teimum flestu tíðarneyð, og manglandi neyvleiki í avgerandi støðum. Við øðrum orðum; styrkismunur.

Føroyska felagið liggur á fimta plássi við 10,5 stigum av 24 møguligum. Átta lið leika í 1. deild, har tvey lið flyta niður. Fjórða umfar verður 11. januar, og tá hitta føroyingar K41, ið liggja næstfremstir.

**1. deild. 4. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| Kollafjørður | Klaksvík | 2-2 |
| Hans Kristian Simonsen | Ólavur Simonsen | 0,5-0,5 |
| Torbjørn Thomsen | Rani Nolsøe | 0,5-0,5 |
| Eyðálvur Johannesen | Finnbjørn Vang | 1-0 |
| Grettir Djurhuus | Tummas M. Anthoniussen | 0-1 |
| Hvalvík/Streymur | Toftir | 2,5-1,5 |
| Martin Brekká | Wensil Højgaard | 0,5-0,5 |
| Sámal Christiansen | Helgi Joensen | 0,5-0,5 |
| Bergur Magnussen | Justinus Hansen | 0,5-0,5 |
| Gunnar Joensen | Øssur Hansen | 1-0 |
| Havnin | Sandavágur | 3,5-0,5 |
| Olaf Berg | Torkil Nielsen | 0,5-0,5 |
| Bogi Ziska | Sonni Nielsen | 1-0 |
| Haldur Suni Johansen | Gutti Petersen | 1-0 |
| Herluf Hansen | Heri Christoffersen | 1-0 |

**Støðan, 1. deild**

| | |
|---|---|
| 1 Kollafjørður | 12,0 |
| 2 Klaksvík | 11,0 |
| 3 Havnin | 8,0 |
| 4 Hvalvík/Streymur | 6,5 |
| 5 Toftir | 6,5 |
| 6 Sandavágur | 4,0 |

**2. deild. 4. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| Runavík | Vestmanna 1 | 1,0-3,0 |
| Havnin | Kollafjørður | 1,5-2,5 |
| Klaksvík | Vestmanna 2 | 2,5-1,5 |

**Støðan, 2. deild**

| | |
|---|---|
| 1. Vestmanna 1 | 12,5 |
| 2. Havnin | 11,5 |
| 3. Kollafjørður | 8,0 |
| 4. Klaksvík | 6,5 |
| 5. Runavík | 5,0 |
| 6. Vestmanna 2 | 4,5 |

**Støðan, 3. deild**

| | |
|---|---|
| 1. Havnin 3 | 22,0 |
| 2. Gøta | 16,0 |
| 3. Sandavágur | 14,0 |
| 4. Havnin 4 | 12,5 |
| 5. Kollafjørður 3 | 12,0 |
| 6. Rókur | 8,5 |
| 7. Vestmanna | 6,5 |
| 8. Miðvágur | 4,5 |

**Støðan, unglingar**

| | |
|---|---|
| 1. Klaksvík a | 16,0 |
| 2. Klaksvík b | 12,0 |
| 3. Miðvágur | 10,0 |
| 4. Sandavágur | 10,0 |
| 5. Havnin b | 10,0 |
| 6. Havnin a | 9,5 |
| 7. Toftir | 8,5 |
| 8. Rókur | 7,5 |
| 9. Vestmanna a | 4,5 |
| 10. Vestmana b | 2,0 |
| 11. Gøta | 2,0 |

**1. deild í Danmark**

| | |
|---|---|
| Talvfelagið Føroyar-Helsinge | 1-7 |
| IM Nikolaj Borge-GM Peter Heine Nielsen | 0-1 |
| John Arni Nilssen-GM Lars Schandorff | 0-1 |
| Flóvin Tór Næs-IM Emmannuel Berg | 0-1 |
| IM John Rødgaard-IM Klaus Berg | 1/2-1/2 |
| Heini Olsen-IM Steffen Pedersen | 1/2-1/2 |
| Eyðun Nolsøe-TM Thomas Hutters | 0-1 |
| Carl Eli N. Samuelsen-Niels J. Fries Nielsen | 0-1 |
| Heini Danielsen-David Bekker Jensen | 0-1 |

**Støðan eftir 3. umfar:**

| | |
|---|---|
| Helsinge | 20,0 |
| K41 | 15,0 |
| Skolerne | 14,0 |
| Brønshøj | 12,5 |
| **TF-Føroyar** | **10,5** |
| SK 1968 | 9,0 |
| Århus | 7,5 |
| Nørresundby | 7,5 |

**Einkultúrslitini hjá føroyingunum higartil:**

| | |
|---|---|
| GM Einar Gausel | 1,5 av 2 |
| IM Nikolaj Borge | 1/ 3 |
| John Arni Nilssen | 1,5/3 |
| Flóvin Tór Næs | 1/3 |
| IM John Rødgaard | 0,5/1 |
| Heini Olsen | 2/3 |
| Eyðun Nolsøe | 0/3 |
| Carl Eli N. Samuelsen | 2/3 |
| Heini Danielsen | 1/3 |




Vágatunnilin verður 1 ár

Í tí sambandi hava vit opið til kl. 23.00 tann 10. desember og vit geva -15% av øllum skóm

Hjá Randi
Tel 33 38 70 // 370 Miðvágur

Sosialurin 341800



## Avloysari fyri hjálparfólk

Dagstovnurin í Kvívík søkir eftir avloysara fyri hjálparfólk (fulltíðarstarv) til Frítíðarskúlan, at byrja skjótast til ber, og til 1. mars 2004.

Umsókn við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndum og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi skjótast til ber.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran fyri Dagstovnin, Jónu E. Jacobsen, á tlf. 421760.

**Kvívíkar kommuna**
FO-340 Kvívík



## Fólkaflokkurin í Eysturoy

Fyrsti uppstillingarfundur til løgtingsvalið verður í Stranda Centrum hóskvøldið 11. december kl. 20.00.

Anfinn Kallsberg og Jógvan á Lakjuni verða við.

**Eysturoyar Fólkafloksfelag**



## Eyka býráðsfundur

verður hósdagin 11. desember kl. 16.00 í býráðshøllini.




**Runavíkar býráð**



## Uppstilling til formansval í Starvsmannafelagnum

Sambært § 12, stk. 3 í lógum felagsins verður boðað til uppstilling til formansval í Starvsmannafelagnum.

Fastur formaður skal veljast á aðalfundi felagsins í februar 2004. Uppstillingin skal verða liðug innan 15. januar 2004.

Uppstillað verður á tann hátt, at boðað verður skrivstovu felagsins skrivliga frá, at limur sjálvur ynskir at stilla upp, ella at limur ella limir ynskja at stilla annan lim upp. Stillar limur ella stilla limir annan lim upp enn seg sjálvan, skal samtykki valevnisins fylgja við uppstillingarfráboðanini.

Tann skrivliga frásøgnin um uppstilling skal verða skrivstovu felagsins í hendi ikki seinni enn 15. januar 2004. Í frásøgnini skal verða tilskilað navn og bústaður hjá valevninum, og hvar valevni arbeiðir.

Formansstarvið er lønt, og bert tann, sum tekur starvið upp sum fulltíðarstarv burturav, kann verða valdur. Sambært sáttmálan hevur tann, sum verður vald/ur til formann í felagnum rætt til at fáa farloyvi frá arbeiðsplássinum alla formanstíðina, soleiðis at stovnurin hevur skyldu til at hava starv til hana/hansara, tá formanstíðin er úti.

Aðalfundurin velur formannin beinleiðis við vanligum meiriluta.

Limir verða, í seinasta lagi tá aðalfundurin verður lýstur, kunnaðir um, hvørji formansvalevni verða at velja ímillum á aðalfundinum.

Víst verður annars sum heild til § 12 í felagslógini.

Fráboðanir um uppstilling verða at senda til

STARVSMANNAFELAGIÐ
**J.H. Schrøtersgøta 9**
**Postboks 165**
**110 Tórshavn**



## Góðir brúktir bilar

| | |
|---|---|
| **Nissan Almera 1.4 S** gráur, árg 1999, 5 hurðar, km. 48.000 **97.000** | **Opel Vectra 1.7 DT** reyður, árg 1996, 4 hurðar, km. 195.000 **79.000** |
| **Nissan Almera 2.0 Diesel** vínreyður, árg 1999, 4 hurðar, km. 61.000 **nú 89.000** | **Opel Vectra 1.7 DT** bláur, árg 1996, 5 hurðar, km. 125.000 **85.000** |
| **Nissan Almera 1.6 GX** vínreyður, árg 2000, 4 hurðar, km 88.000 **nú 95.000** | **Ssangyong Musso 2.9D 100 HK Van** grønur, árg 1997, 5 hurðar, km. 102.000 **130.000** |
| **Peugeot 306 Diesel Turbo** gráur, árg. 1995 4 hurðar, km. 206.000, toppstykkið skift **nú 65.000** | **Ford Fiesta 1.3** reyður, árg 1997, km. 88.000 **46.000** |
| **Peugeot 406 1.8** grønur, árg. 1997, 4 hurðar, km. 129.000 **99.000** | **Ford Escort 1.8d** bláur, árg 1997, 5 hurðar, km. 127.000, fyrr 57.000,- **nú 35.000** |
| **Peugeot 406 ST 2.0 Hdi v/aircon** vínreyður, árg. 1999, 4 hurðar, km. 120.000, fyrr 145.000,- **nú 135.000** | **Ford Escort 1.8** bláur, árg 1995, 4 hurðar, km. 101.000 **59.000** |
| **Opel Agila** grønur, árg 2001, 5 hurðar, km. 36.000, fyrr 110.000,- **95.000** | **Ford Orion 1.8 Diesel** bláur, árg 1991, 4 hurðar, km. 131.000 **25.000** |
| **Opel Astra 1.6 Station car** hvítur, árg 1996, 5 hurðar, km. 61.000 **68.000** | **Daewoo Lanos 1.5** reyður, árg 1999, 5 hurðar, km. 53.000, fyrr 79.000,- **nú 62.000** |
| **Opel Astra 1.6 16V Stc** gráur, árg 1999, 5 hurðar **110.000** | **Mazda E-serie 2200 Diesel** gráur, árg 2002, 5 hurðar, km. 17.000, skrásettur sum persónbilur **v/mvg 175.000** |
| **Opel Astra 1.7 DT** grønur, árg 1997, 4 hurðar **65.000** | **Toyota Corolla 1.3 XLi** reyður, árg 1997, 3 hurðar, km. 79.000 **67.000** |
| **Opel Astra 1.7 DT** grønur, árg 1999, 5 hurðar, km. 97.000 **119.000** | **Toyota Carina E 1.6** hvítur, árg 1995, 4 hurðar, km. 138.000 **67.000** |
| **Opel Astra 1.6 Comfort** svartur, árg 1998, 5 hurðar, km. 77.000 **85.000** | **Toyota Corolla 1.6 Star Linia Terra** grønur, árg 2002, 5 hurðar, km. 18.000, seldur fyri kunda **160.000** |
| **Opel Vectra 1.7 DT** grønur, árg 1995, 4 hurðar, km. 210.000 **65.000** | |

Sosialurin 341800

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu vera settir á telefon 34 54 00,
eisini ber til at senda teldupost til: nissan@nissan.fo
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61



## Norðoya Javnaðarfelag

Fyrsti uppstillingarfundur til løgtingsvalið verður hóskvøldið 11. desember kl. 20.00 á loftinum í Skálanum.

**Nevndin**



## Suðuroyar Syðra Javnaðarfelag

Fyrsti uppstillingarfundur til løgtingsvalið verður í húsinum hjá Vágs Matmóðrarfelag tórskvøldið 11. desember kl. 20.30.

**Nevndin**


www.sosialurin.fo